# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*11. apríl kom hesin drongurin í verðina á Nykøbing Falster hospital. Foreldur hansara eita Charlotta Kristensen og Jógvan Kárason Hansen. Hann vigaði 3500 gr. og var 54 cm langur. Tey búgva í Holeby á Lollandi.*

7. apríl fingu Arnóra Thomsen og Kári Johansen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3200 gr.

8. apríl fingu Jacobina Heinesen og Finnbogi Olsen, Vágur, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4450 gr.

10. apríl fingu Jenny og Høgni á Lakjuni, Fuglafirði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3650 gr.

10. apríl fingu Annelisa og Jens Kristian Rasmussen, Strondum, ein son. Hann var 60 cm langur og vigaði 4350 gr.

11. apríl fingu Marita og Jógvan Vilhelm, Klaksvík, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2900 gr.

11. apríl fingu Anna Maria Petersen og Vagnur Streymoy, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3225 gr.

12. apríl fingu Maiken og Ib Mohr Olsen, Sandi, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4200 gr.

12. apríl fingu Lydia og Jan P. Jacobsen, Søldarfirði, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4150 gr.

## Andlát

6. apríl
Aksel Christiansen í Lerivík, 82 ár.

7. apríl
Jytta Jacobsen, Glyvrar, vanliga nevnd Jytta á Bakka, 90 ár.
Marna úr Konoy frá Gøtugjógv, 84 ár.

9. apríl
Asaf Olsen úr Søldarfirði, 77 ár.
Ottar Jacobsen, fyrrverandi skúlastjóri, Tórshavn, 73 ár.

10. apríl
Sofía Gaard, Oyndargjørður, ættað úr Norðragøtu, 88 ár.

12. apríl
Elsa Klakkstein, Klaksvík, 98 ár.

13. apríl
Jóhanna Katrina Johannesen, Kunoy, 93 ár.
Ellen Elisabeth Olsen, fødd Nolsøe, Neslíð, Vágur, 85 ár.

## Brúdleyp

Í dag, 16. apríl kl. 17.00 giftast í Vesturkirkjuni Sanna Poulsen ogJóan Pauli Joensen, Tórshavn. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00.

## 75 ára føðingardagur

Sunnudagin 17. apríl verður Klæmint Nónklett, Søldarfirði, 75 ár. Kaffimuður verður uppi í Toft í Søldarfirði eftir kl. 15.00.

## Ein heilsan til minnis um vinkonu mína

# Onnu Petersen

## (Onnu í Føroya Bjór)



Fátæksligt kennist tað, tá vinur, ið er farin um sýn, skal umrøðast, men eg fari at royna

Góða Anna, tað er ikki lætt at seta orð á tað, sum hjartað floymir yvir av, tí Anna, tú fylti so nógv í okkara dagligdegi.

Fimmti ár eru ikki fimmti dagar. Fyrst nú veit eg, hví tað var so umráðandi, at vit vinkonurnar skuldu hittast 22/5-2004 í Keypmannahavn. Góða Anna, tú visti tað, men einki tú segði, so stolt sum tú altíð var. Tú hevði kortini nevnt okkurt um, at tú føldi teg ikki so væl, hví so til Danmarkar? Tú hevði eisini sagt við onkran, sum stóð tær nær, at hetta bleiv helst tín seinasta Keypmannahavnarferð, og so varð.

Tá tú setti upp á at fara at vitja Bussi í Roskilde, sum tá var so sjúk, royndi eg at siga tær, at tað var ov strævið, men einki hjálpti, gott tað sama. Tú fekst sagt farvæl. Tað blivu bert fjúrtan dagar, frá tí Bussi fór, til tú fór sama veg, har eingin kemur aftur.

Tað kundi verið so nógv at trivið í. Eitt, sum gleddi meg so ómetaliga nógv, var at sita í kirkjuni og síggja tann stóra vinaskara, sum komin var at siga tær farvæl fyri seinastu ferð. Somuleiðis gleddi tað meg at síggja kirkjuna so vakurt skrýdda við tínum yndislitum, men tú manglaði. Gloymd er tú ikki og verður tað heldur ikki.

Vit vitja teg á kirkjugarðinum, men tað riggar ikki. Tú, sum var so livandi, hví so vitja teg her. Vit standa bert spyrjandi.

Eitt má eisini sigast, at tú elskaði títt arbeiði á Føroya Bjór, og tú var góð við allar tínar kundar, altíð vinsæl, fyri tær vóru øll eins, lágur sum høgur, og ongantíð var tað nakar, sum merkti á tær, at tú var móð. Kortini skal sigast, eg sum kendi teg so væl, at tú var ongantíð tann sama aftur, eftir at Martin var deyður, men tað skilji eg so væl, tit høvdu livað so leingi saman, so tað tómrúmið var eingin førur at fylla. Hvíli í friði, tit bæði, og takk fyri alt.

Eg hugsi ofta um tykkum Flemming, Petur og børn tykkara, tit hava mist so nógv: Eina mammu og ommu, sum bert livdi fyri tykkum og tykkara. Ein uggi er tað tó, at hann, ið øllum ræður, hann uggar og styrkir okkum øll.

**Vinkona tín Grethe**

# Klæmint Nónklett 75 ár

Sunnudagin 17. apríl fyllir Klæmint Nónklett í Søldarfirði 75 ár.

Hann er føddur og uppvaksin í Lamba í bóndahúsi, sonur Katrinu (Trinu) og Jóhannus Nónklett bónda í Lamba. Hann er elstur av fimm syskjum: Klæmint, Samalena, Símun, Elsa og Karin.

Sum ungur var hann til skips eina tíð, so koyrdi hann lastbil, sum hann ognaði sær úr Saltnesi. Hann gjørdi vegarbeiði og koyrdi eisini vøru út fyri P.W. í Søldarfirði o.a. fyrifallandi.

Í 1955 giftist hann við Bergliott (Begg) úr Søldarfirði, tey búsettust í Lamba og fingu tvey børn, Katrinu (Dinna), gift við Eyðun Jacobsen úr Klaksvík, tey eiga 3 gentir.



Pauli giftur við Frígerð úr Runavík, tey eiga 3 dreingir.

Í 1960 fór Klæmint at koyra gravkúgv hjá LV. Hann var suðuri í Sumba til at gera keiina har, oyggjarvegin og mangt annað. Hann var bóndi eisini, og ognaði sær eisini blaðkúgv sjálvur, sum hann koyrdi líka til 1980, tá hann og Begg fóru niður á Hirshólmin at passa fýr.

Har trivust tey ómetaliga væl. Hann hevði fleiri bátar hetta tíðarskeiði av ymiskun slag, bæði plast og træ. Hann royndi við gørnum eftir sild, reyðspettum, tungu, toski, o.ø. setti állarúsur, hummararúsur, roykti sild og áll til turistarnar, sum komu út á hólman um summarið, so har lógu nógvir lystbátar gjøgnum alt summarið.

Tey keyptu sær eini hús inni í Fredrikshavn. Tað dámdi teimum væl, at kunna fara inn har at halda frí í nakrar dagar. Í 1993 doyði Begg. Eftir tað fór hann at arbeiða við fýrin í Skagen, til hann fór frá sum 67 ára gamal. Í 1997 giftist hann við Ruth Rasmussen úr Søldarfirði, og fluttu tey til Føroyar sama árið og búsettust uppi í Toft í Søldarfirði. Hann fekk sær bát, tá hann var komin heim aftur. Hann roynir eftir goggum, og setur gørn eftir sild tá tann tíðin er. Hann hevur eisini eitt gásapar, so okkurt er at tríva í, nú hann er komin nakað upp í árini. Eisini hevur hann fingið tveir langabbasynir.

Tað verður ein kaffimuður at fáa aftan á kl. 15.00 uppi í Toft í Søldarfirði. Hjartaliga tilukku við degnum.

**Dagurin**

**16. apríl. Mariana.** Teir vita onga halga konu við hesum navni. Dagurin hevur eisini verið róptur magnusarmessa, til minnis um Magnus Erlendsson. Hann var jallur yvir helvtini av Orknoyggjunum, men systkinabarn hansara Hákun Pálsson, sum hevði hina helvtina, søkti at honum, og Magnus varð halshøgdur tann 16. apríl í 1115. Magnus varð seinni skírdur halgimenni, og dómkirkjan í Kirkjubø er vígd honum. Í halgilutaskápinum í múrinum eru bein av Magnusi.

**17. apríl. Anicetus,** deyður umleið ár 166. Hann var pávi. Í Føroyum hevur mansnavnið Setus verið brúkt.

**18. apríl. Eleuterius,** biskupur í Illýriu, tikin av døgum um leið ár 200. Dagurin verður eisini skrivaður Elenterius.